# Hin óræddi Galilei velur eyðmýking og húsavarðhald fram um deyðan



Altjóða stjørnufrøðiár 16

Pól Jespersen

**Katólska kirkjan skipar fyri, at Galileo Galilei, sum stundum hevur verið nevndur faðir at vísindunum, skammiliga verður eyðmýktur**

Galilei var sjáldsama gávuríkur granskari. Hann dugir tað ástøðiliga, hann er ein frálíkur eygleiðari, hann hevur skil fyri tí at gera royndir, og hann dugir at uppfinna nýggja tól. Á øllum hesum økjum skarar hann framúr.

Avrikini hjá Galilei minka einki av tí, at vit nú vita, at hann kanska ikki var fyrstur at eygleiða himmalhválvið í kikara - ein annars lítið kendur enskur stjørnufrøðingur og støddfrøðingur, Harriot, granskaði mánan í kikara longu í juli í 1609. Í vísindasøguni eigur Galilei sess undir liðini á Aristoteles, Newton og Einstein.

Veturin 1609-10 man hava verið ótrúligur hjá Galilei, ikki minst løtan, tá ið hann ásannar, at Jupiter hevur 4 stórar mánar, sí myndina.

Galileisku mánarnir, sum teir enn verða nevndir, eru tó ikki prógv fyri, at jørðin gongur um sólina. Tað prógvið fann Galilei eisini.



Dagbókarblað hjá Galilei frá januar mánaði í 1610, tá ið hann í kikaranum sær, at 4 stórir mánar mala í ringrás um gongustjørnuna Jupiter. Myndin vísir, hvussu hann teknar Jupiter og mánarnar hesar dagarnar.

Kopernikus hevði gjørt eina forsøgn um fasurnar hjá Venus í teirri vón, at tað einaferð fór at bera til at síggja tær. Galilei staðfesti, at Kopernikus hevði rætt, og at fasurnar als ikki vóru, sum tær skuldu verið, um ptolemeiska skipanin við jørðini í miðdeplinum var tann rætta. Nú kundu vit kanska væntað, at tann seinasti ivin um heliosentrisku skipanina hvarv, men so var ikki. Katólska kirkjan helt treiskliga fast við sítt.

Í 1616 verður Revolutionibus hjá Kopernikusi sett á svartalista, 73 ár eftir útgávuárið. Kirkjan fordømir eisini arbeiðið hjá Galilei. Tað kann hann als ikki góðtaka, tí hóast hann er trúgvandi (katolikkur), er hann fram um alt rationalistur.

Í 1623 verður vinmaður hansara, kardinalurin Barberini, pávi. Teir báðir kennast úr Firenze og nýggi pávin, Urban VIII, hevur hoyrt Galilei sjálvan greiða frá síni gransking. Galilei er til fleiri móttøkur hjá nýtilnevnda pávanum og nevnir undir einari av hesum samrøðum møguleikan at skriva eina bók um tær báðar heimsmyndirnar, sum ikki ber til at sameina. Galilei fer úr Vatikaninum við tí sannføring, at pávin heldur hetta vera gott hugskot. Í teirri trúgv setist hann at skriva.

Í bókini Dialogo, sum verður givin út í 1632, letur Galilei tríggjar persónar kjakast. Salvati talar fyri heliosentrisku heimsmyndini, býttlingurin Simplicio fyri geosentrisku heimsmyndini, og Sagredo er (partískur) uppmaður.

Tað, sum ikki hevði verið fyrr, tað verður nú. Rættarmálið ímóti Galilei verður ein tann svartasti kapittulin í allari vísindasøguni, har ið býttleiki vinnur á viti og skili. Pávin roynir at leggja hald á útgávuna, men tað er ov seint. Fólksliga bókin




Permumyndin til Dialogo, útg. í 1632, hjá Galileo Galilei

(hon er skrivað á italskum!) er útseld. Galilei fær boð at møta fyri Inkvisitiónini í Róm. Hann ber seg undan av sjúku, men einki hjálpir. Málið, sum kemur fyri í apríl í 1633, endar við tí, at Galilei afturkallar og avsvør sínar tesur. Tá ið hann reisist, eftir at hava skrivað undir, teskar hann "Eppur si muove", t.e., "Hon (jørðin) melur nú kortini". Við hesum undirstrikar hann, at alheimurin fylgir sínum egnu reglum, og spyr ikki eftir, hvat ið kirkjan heldur. Fongsulsrevsingin verður broytt til lívlangt húsavarðhald - í leigaðum húsum í Firenze. Galilei doyr 8. januar í 1642. Sum seinastu beistagerð sýtir kirkjan honum vígda jørð. Í desember sama ár verður Isaac Newton borin í heim. Hann er maðurin, sum av álvara flytur mørk.